# ítróttur

Nr. 8 • hósdagur • 13. januar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Todi trýr upp á tað

**Fyri fyrstu ferð í fleiri ár kennir føroyski álopsspælarin í FCK seg at vera eins væl fyri og liðfelagarnir, nú teir í eina viku hava verið í holtur við krevjandi fysisku vetrarvenjingina**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*



*Todi Jónsson er sera spentur upp á at fara undir kappingina aftur, og hann sigur tað verða nógv ár síðani, at hann hevur verið so væl fyri í uppstartinum eftir vetrarsteðgin*

Fyri føroyska áhugan í superliguni og serliga fyri álopstyngdina á landsliðnum er tað týdningarmikið, at tað tykist ganga, sum tað skal hjá Toda Jónsson. Hann tekur ein dag í senn. Og hann er væl nøgdur við, hvussu tað hevur tikið seg upp fyrstu vikuna, eftir at FCK er farið undir fyrireikingarnar til seinna partin av hesum kappingarárinum.

– Fleiri av undanfarnu árunum hevur tað verið soleiðis, at eg havi ikki verið førur fyri at luttaka á jøvnum føti við hinar, tá ið vit eru farnir undir tungu vetrarvenjingina. Tað hevur havt við sær, at tá ið hinir hava pussað formin av í sjálvum spælinum, so havi eg ikki verið líkamliga so væl fyri, sum teir hava verið. Soleiðis er tað ikki nú, og tað eri eg sjálvandi fegin um, sigur Todi Jónsson úr Keypmannahavn.

Todi fer í vár at spæla fyri fótbóltsframtíðini, og tískil kemur tað sjálvandi serliga væl við, at tað nú tykist ganga betri, enn tað leingi hevur gjørt. Sáttmálaskeiðið í FCK verður liðugt síðst í juni, og tað er rættuliga avgerandi fyri møguleikarnar eftir summarfrítíðina, hvussu tað fer at hilnast í vár.

– Tað eru fleiri lið í venjingini. Fyrsta treytin er, at tú ert væl fyri líkamliga. Hesum arbeiða vit við hesar fyrstu vikurnar. Vit venja partvís á Frederiksberg, har vit vanliga halda til, og so venja vit í Top Danmark høllini í Ballerup. Tá ið fyrstu tungu venjingarnar eru av, fer serligur dentur at verða lagdur á teknisku og taktisku venjingina. Fyri bóltførleikan og fatanina av spælinum hevur tað alt at siga, at tú ert væl fyri líkamliga, so tað ræður um bæði at ansa sær sjálvum og at leggja nógv fyri nú, og eg eri fegin um, at tað ber mær til at vera við, staðfestir Todi Jónsson.

Fyrsti týdningarmikli dysturin hjá FCK verður sunnudagin 13. februar. Tá skulu teir í Parkini spæla móti Tromsø í Royalu kappingini. Fyrsti steypadysturin verður sunnudagin 6. mars, tá ið FCK skal spæla í Parkini móti Fremad Amager.

Seinni í hesum mánaðinum skal FCK uttanlands á venjingarlegu, og um tað fer at veita eins væl við hjá Toda tá, sum tað higartil hevur gjørt, so er eingin ivi um, at hann verður við á ferðini. FCK skal í døgunum frá 27. januar og til 6. februar venja í La Manga í Spania. Á ferðini skal liðið spæla tveir venjingardystir, og tá fara fyrstu ábendingarnar at fáast um, hvørjar spælarar venjarin, Hans Backe, serliga ætlar sær at hava millum teir fyrstu ellivu. 31. januar skal FCK spæla móti norska Vålerenga, og 4. februar verður mótstøðuliðið í spanska várinum Lokomotiv Moskva.

– Eg havi verið nógv burturfrá orsaka av skaðum, og eg eri millum teir elstu her í FCK. Men eg kenni tað soleiðis, at eg eigi at vera førur fyri at spæla á hesum støðinum í tvey ella trý ár afturat. Treytin er sjálvandi, at skaðarnir ikki fara at plága. Eg taki ein dag í senn, staðfestir Todi, sum framvegis er eins málrættaður, sum hann altíð hevur verið.

# Rógvarafundur í Klaksvíkar Róðrarfelag

**Leygardagin klokkan 13 verður rógvarafundur í neystinum hjá Klaksvíkar Róðrarfelag, har greitt verður frá ætlanum, sponsoravtalum og øðrum í sambandi við komandi kappingarár**

TÍÐINDASKRIV

Nú byrja fyrireikingarnar til komandi kappingarár innan kapproður av álvara. Leygardag klokkan 13 verður rógvarafundur í neystinum hjá Klaksvíkar Róðrarfelag.

Greitt verður frá ætlanum felagsins fyri kappingarárið 2005, sponsoravtalum og øðrum viðurskiftum við. Felagið stendur í vøkstri, og hevur fingið nógvar limir afturat seinasta hálva árið. Hetta kemst serliga av góðu umstøðunum at venja innandura. Eisini hevur felagið tikið upp samstarv við rennifelagið Treysti, sum gevur góðar møguleikar.

Ein av trupulleikunum hjá felagnum, sum hava stungið seg upp seinasta árið, er útfyllingin við Sandin. Men hesin trupulleikin varð loystur herfyri á fundi millum nevndina hjá felagnum og Klaksvíkar kommunu. Avtalað varð, at kommunan skal lata ein drátt gera yvir móti Biskopstø. Tann drátturin skal eftir ætlan vera klárur í hesum mánaðinum. Tað fegnast nevndin í felagnum um, tí nú felagið stendur í vøkstri, er tað sera umráðandi, at umstøðurnar kunnu vera so góðar sum til ber.

Bátarnir hjá Klaksvíkar Róðrarfelag eru fimm í tali? umframt gomlu Fípuna Føgru, sum í dag eitur Snípan og mest verður nýtt til at læra fólk upp við.

Teir fimm bátarnir geva pláss fyri átta manningum til FM róðrarar, sum eru sjey í tali. Hvussu er statt við manningunum er eisini ætlanin at fáa upp á pláss á fundinum leygardagin. Tískil eru øll, sum hava áhuga fyri kapproðri, vælkomin á fund leygardagin.

### Fleiri bátar skulu mannast

Seinastu árini hava bæði barnamanningar og old girls manningar eisini verið ein fastur partur av Klaksvíkar Róðrarfelag. Soleiðis kann eisini verða aftur í ár. Tann eina old girls manningin hevur nú nøkur ár á baki, og verða tær helst aftur á síggja í felagnum komandi kappingarár.

Barnamanningarnar kunnu vera fýra í tali. Tvær gentu og dreingjamanningar, sum koma at rógva við ávíkavist Fípuni Føgru og Teklu, sum bæði eru fimm mannafør.

Tað eru manningar, sum hava víst dreingja- og genturóðrinum í FM kappingini áhuga, men tað er onki til hindurs fyri, at onnur áhugað ikki kunnu koma upp á tal, tí enn eru allar manningarnar ikki endaliga komnar upp á pláss. Páll Fangi við kvinnum er um at vera mannaður, meðan tað kanska er heldur óvíst við monnunum. Nevið Reyða manglar framvegis fólk og Klaksvíkingur er ikki mannaður. Sum sagt, hevur tú hug at rógva í summar, er tað at møta í róðrarneystinum leygardagin klokkan 13.00